VINNUHÚSIÐ
House of Industry

# Fiskivinnuroyndir 2002

Játtanin til Fiskivinnuroyndir á løgtingssins fíggjarlóg er góðar 8 milliónir krónur. Í viðmerkingunum til játtanina verður sagt:

> *"Fiskimálastýrið umsitur Fiskivinnuroyndir, sum verða fyriskipaðar í samstarvið millum Fiskirannsóknarstovuna, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og Menningarstovuna. Vinnan luttekur eisini í hesum arbeiði. Játtanin er til fiskiroyndir og kanningar, herímillum vørumenning og hvussu sum mest fæst burtur úr øðrum fiskasløgum"*

Stýrisbólkur, sum fevnir um umboð úr nevndu stovnum og fólki úr fiskivinnuni, hevur gjørt eina stevnu fyri Fiksivinnuroyndir umframt umsóknarbløð, vegleiðingar og tilfar, sum greiðir frá ynskjunum og krøvunum til einhvørja verkætlan, áhugaði kunnu fara undir.

## Stevna

**Málsetningur**

Stevnan fyri fiskivinnuroyndum er at fremja royndir og kanningar - bæði vinnuligar og vísundaligar, ið kunnu verða við til at menna føroyska fiskivinnu, fiskiskap, fiskavirking og fiskasølu við atliti til burðardygga gagnnýtlsu av okkara havtilfeingi og at trygd og nøgdsemi brúkarans verður sett í hásæti.

**Raðfest økir**

1. Burðardyggur fiskiskapur.

Hetta kann verða praktiskar royndir ella vísundaligar kanningar, sum hava til uppgávu:

- at gagnnýta fiskasløg, sum ikki verða gagnnýtt í dag.
- at menna skynsaman trolreiðslap, soleiðis at ávirkanin á botnin verður sum minst, at menna ristteknologiina og onnur selektiv inntriv.
- at menna línutøkni sum heild (línu, agn og egning, umframt brúka av KT í menningini)

2. Gagnnýtsla av hjáframleiðslu:

Hetta kann verða praktiskar royndir ella vísundaligar kanningar, sum hava til uppgávu:

- at økja um hjáframleiðslupartin, sum fer til matna og finna tekniskar loysnir fyri hesum
- at finna tekniskar loysnir uppá, hvussu garnarnar best kunnu koma til høldar,
- at finna loysnir í sambandi og sølu av gørnum til matna, men eisini til annað brúk

3. Sjómatartrygd og nøgdsemi brúkarans

Hetta kann verða praktiskar royndir ella vísundaligar kanningar, sum hava til uppgávu:

- at finna loysnir sum kunnu skjalfesta betri sporføri av vøruni og upplýsing til endaliga brúkaran.
- at finna loysnir fyri dálking og smittu umframt teir vegir hesi finna til matin. Herí eisini vísundaligar metingar av sannlíkindum og vandanum fyri dálkingini /smittuni.

4. Virðisøking av upsatilfeinginum

Hetta kann verða praktiskar royndir ella vísundaligar kanningar, sum kunnu hava við sær at virðið á upsatilfeinginum verður økt. Hetta kann verða:

- at finna nýggjar og betri hættir at virka upsan
- at finna nýggjar og betri sølumøguleikar

## Umsóknir:

Vinnuligar fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um pening úr fiskivinnuroyndum. Søkt verður á serligum umsóknarblaðið.

Umsóknir skulu verða Vinnuhúsinum í hendi innan hósdagin 24 januar 2002.

Umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst frá Vinnuhúsinum. Tilfarið verður eisini lagt út á heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum www.industry.fo

Áhugað eru eisini vælkomin at venda sær til Ásmund Guðjónsson, samskipara við møguligum spurningum og øðrum.

**Ásmundur Guðjónsson, samskipari**
**Vinnuhúsið**
RC Effersøesgøta 30
100 Tórshavn
tel: 311864
faks: 317278
t-postur: asmundur@industry.fo

## Kunngerð um afturlatingartíðir og vaktarhald hjá SEV um jólini og ársskiftið

Gjørt verður kunnugt, at allar skrivstovur hjá SEV eru stongdar frá fríggjadegnum tann 21. desember 2001 kl. 16.00 til 2. januar 2002 kl. 8.00, og at øll linjuarbeiði o.a., sum tolir at bíða, verður steðgað í sama tíðarskeiði.

Um brek er á elveitingini frá SEV, ber til at fáa fatur á vakt okkara við at ringja til eina av skrivstovunum á hesum telefonum:

| | |
|---|---|
| Tórshavn | tlf. 311366 |
| Vestmanna | tlf. 424433 |
| Klaksvík | tlf. 455002 |
| Vágur | tlf. 373016 |

Vaktin svarar alt døgnið.

*Tórshavn, tann 18. desember 2001*

Elfelagið SEV

## Skeið í 1. hjálp

Fyrstahjálparskeið 12 tímar og/ella 16 tímar byrja 11. og 12. januar, um nóg nógv tekna seg. Hevur tú annað ynski, so sig frá.

Tú kanst tekna teg við at ringja tlf. 319630 ella við telduposti til: redcross@redcross.fo ella við at senda henda lepa inn áðrenn mikudagin 09.01.02 kl. 21.00.

Skeiðini verða hildin um vikuskifti í Havn, uttan so, at nóg nógv tekna seg aðrastaðni, so kann skipast hold uttan fyri Havnina.

Navn ______________________

Bústaður ______________________

Tlf. ______________________

Ynski ______________________

**Haldarar hjá Dimmalætting og Sosialinum,**

**sum ikki fáa leygardagsbløðini, verða biðin um at ringja tlf. 253497 leygardag millum kl. 11 og 14**

**Prentmiðstøðin**






**Í kvøld og leygarkvøldið:**

**Ronnie, Herluf & Kolbein**

**Café Natúr er opið soleiðis um jólini:**

| | |
|---|---|
| 23. des.: | Sum sunnudag |
| 24.-25. des.: | Stongt |
| 26. des.: | kl. 18.00-04.00 |
| 27. des.: | Sum sunnudag |
| 31. des.: | Stongt |
| 1. jan.: | Vit lata upp kl. 14.00 |

*livandi tónleikur*

CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25

Sosialurin 311820

Vit ynskja viðskiftafólki okkara eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár við tøkk fyri gott samstarv í farna ári.

**Kjalnesbúðin**
Kollafjørður

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3285
Navn: Sp/f Kla-Con
Adressa: Mýrivegur 7, 700 Klaksvík
Kommuna: Klaksvíkar Kommuna
Stovningardato: 15.12.2001
Viðtøkudato: 15.12.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Arnbjørn Joensen, Mýrivegur 7, 700 Klaksvík
Stjórn: Arnbjørn Joensen, Mýrivegur 7, 700 Klaksvík
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: Búskaparstovan Finnur Sivertsen, Boks 300, 700 Klaksvík.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 15.12.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at veita tænastur innan frálandavinnu, handil, ídnað og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 20. desember 2001

Kristin Balle

## Tøknileiðari

**Sjónvarp Føroya søkir eftir tøknileiðara.**

Tøknileiðarin hevur ábyrgdina av viðlíkahaldi, supporti og útbygging av teknisku útgerðini hjá SVF, herundir eisini KT-kervinum. Hann umsitur alt innkeyp av KT- og tøkniútgerð. Hann leiðir dagligu tøkni- og KT-serviseringina av framleiðslu og umsiting. Hann er leiðari fyri tøkni- og KT-vørðarnar í húsinum, umframt fólkið, ið sendir. Somuleiðis stendur tøknileiðarin fyri útbúgving av starvsfólkunum í nýtslu av nýggjari tøkni. Sjónvarpið er miðskeiðis í eini umfatandi umlegging av framleiðsluni frá analogari til digitala tøkni. Digitaliseringsætlanin er eitt sjálvstøðugt projekt, við einum eksternum ráðgeva knýttum at sær. Nýggi tøknileiðarin kann eftir egnum ynski heilt ella lutvíst yvirtaka hesa projektleiðslu.

Sjónvarp Føroya fyrireikar ein nýggjan bygnað, og kemur tøknideildin væntandi at gerast partur av framleiðsludeildini, ið samskipar og leggur tilrættis alla framleiðslu sjónvarpsins. 5 størv eru í løtuni normeraði beinleiðis undir tøknileiðaranum.

**Útbúgving og royndir:** Holla útbúgving innan KT- ella samskiftistøkni, ella tilsvarandi arbeiðsroyndir. Gott innlit í nýggjastu KT- og samskiftistøknina. Aðrar viðkomandi útbúgvingar og arbeiðsroyndir.

Royndir við arbeiði innan loftmiðlatøkni er ein fyrimunur, men eins stóran týdning hevur hollur kunnleiki til samskiftis- og KT-tøkni, og at tú hevur evnini at seta teg inn í nýggja tøkni og nýggjar uppgávur, analysera arbeiðsgongdir og finna og laga tøkniligar loysnir til tørvin í dagliga arbeiðinum hjá ymiskum starvsbólkum. Vit vænta okkum harumframt, at tú hevur góð leiðslu- og samstarvsevni.

Fyri tann rætta umsøkjaran er talan um eitt sera spennandi starv, har tú hevur møguleikan at vera við at menna nýggjar loysnir og arbeiðshættir fyri stovnin komandi árini. Sjónvarpið sum miðil stendur framman fyri kollveltandi tøkniligum avbjóðingum, har nógvir nýggir møguleikar fyri samskifti við brúkaran standa í boði. Sum tøknileiðari verður tú við til at ávirka, hvørja leið Sjónvarp Føroya skal velja í framtíðar tøknimenning síni.

**Løn og setanartreytir:** Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Starvið er lønt í lønarbólki 8 og verður sett frá 1. mars, 2002, ella skjótast gjørligt.

Umsóknir við CV, prógvum og viðmælum verða at senda til Sjónvarp Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 4. januar, 2002.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóra, telefon 340400.

**Sjónvarp Føroya**

***Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. SvF fíggjar sjálvt rakstur sín. Inntøkurnar stava frá hyggjaragjaldi, umframt handilsligum virksemi.***

team85

**Alt**
**- til skrivstovuna**

- Brævordnarar
- Kopipappír
- Skiljibløð
- Pennar o.a.

Tað, sum vit ikki hava á goymslu, fáa vit til vega skjótt

**Sp/f J.D.Hammer**
800 Tvøroyri
Tlf. 372198 · Fax 371198

